Munnligur fyrispurningur til

**Jørgen Niclasen, landsstýrismann**

um lógaruppskot, ið verða latin Løgtinginum, uttan hoyringssvar

1. Hvønn týdning heldur landsstýrismaðurin at hoyring hevur tá umrøður lógaruppskot?
2. Hví velur landsstýrismaðurin at lata Løgtinginum umfatandi lógaruppskot uttan at hoyringssvar eru við?
3. Hví sendir landsstýrismaðurin lógaruppskot til hoyringar, tá hoyringssvarini ikki verða tikin við í lógaruppskotini, áðrenn hesi verða løgd fyri Løgtingið?
4. Heldur landsstýrismaðurin at hetta samsvarar við góðan fyrisitingarsið?

**Viðmerkingar**
Fleiri lógaruppskot eru nú løgd í Løgtingið viðvíkjandi eftirløn. Hetta hóast hoyringsfreistin hjá øllum teimum pørtum, ið hava fingið hetta til hoyringar, ikki er úti fyrr enn 15. november.

Einaferð enn hevur landsstýrismaðurin í fíggjarmálum sostatt valt, at fara í Løgtingið við umfatandi lógaruppskotum áðrenn hoyringssvar eru komin inn og áðrenn hoyringsfreistin var av. Hetta arbeiðslagið kenna vit aftur frá øðrum stórmálum hjá landsstýrinum. Sama varð gjørt eitt nú í sambandi við avtøku av Landsbankanum og forskatting av pensjónum.

Lógaruppskot verða send til hoyringar fyri at fáa viðkomandi íkast frá øllum viðkomandi pørtum til lógaruppskotið, áðrenn hetta er endaligt og áðrenn hetta verður latið Løgtinginum. So er tó ikki við eftirlønarlógini og fleiri øðrum stórmálum úr Fíggjarmálaráðnum.

Fyri at fáa lýst, hvørja støðu landsstýrismaðurin hevur til hoyringar, sum part av fólkaræðisligu tilgongdini tá lógir verða gjørdar, verða hesir spurningar settir.

Á Løgtingi, 5. november 2013

**Kristina Háfoss**
Løgtingskvinna fyri Tjóðveldi